## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og fyrrapartin regn, seinnapartin ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinni snarar hann í landsynning. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, seinni snarar hann í norðan og útnyrðing. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 7 og 11 stig.

# FÓLKATÓNLEIKAR-STEVNAN 2005

TÍÐINDASKRIV
*frá Føroya Fólkatónleikarafelag*



Í døgunum frá 20. til 25. juli skipar Føroya Fólkatónleikarafelag fyri árligu Fólkatónleikarstevnuni. Eins og trý tey undanfarnu árini verður Fólkatónleikarstevnan eisini hesa ferð partur av G!-festivalinum í Gøtu.

Við á Fólkatónleikarstevnuni í ár eru útlendsku bólkarnir Afenginn, Færd, Reel de Quebec og Tónabond yvir hav (úr Hetlandi og Føroyum) og vísusangarin Nadin úr Irak, umframt føroysku luttakararnar, ið eru Niels Midjord, Kári Sverrisson og bólkurin Spælimenninir.

Framførslur verða í Havn, Fugloy, Syðrugøtu, Runavík og Mykinesi.

**AFENGINN** er ein lívligur finskur/danskur/pólskur bólkur, ið mong mundu taka til sín fyrru ferðina hann vitjaði her fyri hálvum øðrum ári síðani. Tað er serliga mandolinleikandi finnin í bólkinum, Kim Nyberg, ið smíðar tónleikin hjá Afenginn og hetta lagasmíð hevur sín uppruna í finskum og donskum fólkatónleiki, men spælir eisini við eyðkenni úr eitt nú klezmer-tónleiki og tónleiki av Balkan. Afenginn gav fyrstu "heilu" fløguna hjá sær út í fjør. Hon ber heitið "Retrograd" og tað var plátufelagið Tutl, ið stóð fyri útgávuni.

**REEL DE QUEBEC**, ið er ein fýramansbólkur úr Danmark, spælir siðbundnan kanadiskan spælimanstónleik og er nógv umbiðin bólkur á flatlondum til sokallaðan squaredance.

**FÆRD** eru danirnir Eskil Romme, ið spælir sopransaxofon og harmoniku, Peter Uhrbrandt, ið er fiólsnillingur av oynni Fanø, og sviin Jens Ulvsand, ið spælir grikska streingjaljóðførið bouzouki. Færd hava verið við á stevnuni áður og tað var í 2002. Ta ferðina saman við bretsku tónleikarunum, Karen Tweed og Ian Carr. Hetta var í sambandi við útgávuna av fyrstu fløguni hjá bólkinum, ið Tutl stóð fyri. Á teirri útgávuni vóru serliga føroysk vísuløg og løg úr nótabókini hjá J.C. Svabo frá 1775.

**TÓNABOND** (Musical Ties Across the Sea) er eitt nýtt og spennandi samstarv millum ungar føroyskar spælimenn (og kvinnur) og hetlendskar. Tónabond er ein verkætlan hvørs endamál er at skapa og styrkja bond millum ungar fólkatónleikarar úr Føroyum og Hetlandi. Bólkurin telur fimm føroyskar tannáringar og fimm hetlendskar, og saman hava tey vant eina fasta skrá við siðbundnum ljóðføristónleiki. Tónlistarligir vegleiðarar hava verið Angelika Nielsen úr Føroyum og Bernadette Porter úr Hetlandi.

**NADIN** er 25 ára gomul songkvinna, ið er født og uppvaksin í Baghdad í Irak, men sum í dag er búsitandi í Svøríki. Hon spælir gittar og ger sínar egnu sangir, men framførir eisini siðbundnar irakiskar sangir.

**SPÆLIMENNINIR** eru Kristian Blak, klaver, Sharon Weiss, blokkfloytu, Angelika Nielsen, fiól, og Ívar Bærentsen, gittar og mandolin. Spælimenninir spæla siðbundnan norðurlendskan, norðuramerikanskan og hetlendskan fólkatónleik, umframt løg hjá Kristiani og Ívari.

**NIELS MIDJORD** spælir gittar og syngur egnar sangir, norðurlendskar vísur og kingosálmar.

**KÁRI SVERRISSON** spælir gittar og syngur egnar sangir.

Skráin fyri Fólkatónleikarstevnuna 2005 er henda:

**Mikudag 20. juli**
**Kl. 21.00 HAFNIA LOUNGE, TÓRSHAVN**
Tónabond (FØR./HETL.)
Færd (DK)
Reel de Québec (DK/Ongl.)

**Hósdag 21. juli**
**Kl. 15:30 HATTARVÍK, FUGLOY**
Niels Midjord
Kári Sverrisson
Nadin (Irak)
Reel de Québec (DK/Ongl.)

20.00 KIRKJA, FUGLOY
Tónabond (FØR/HETL)
Færd (DK)
Afenginn (DK/FIN/PÓL)

**Fríggjadag 22. juli**
**Á G! FESTIVAL Í SYÐRUGØTU**
Kl. 17.45 Nadin (Irak)
Kl. 21.00 Færd (DK/Svøríki)
Kl. 23.00 Spælimenninir

**Leygardag 23. juli**
**Á TORGINUM Í RUNAVÍK**
Kl. 11.00 Tónabond (FØR/HETL)
Kl. 13.00 Nadin (Irak)
Kl. 14.00 Færd (DK/Svøríki)

**Á G! FESTIVAL Í SYÐRUGØTU**
**Kl. 14.45 Tónabond (FØR/HETL)**
Kl. 17.45 Kári Sverrisson
Kl. 22.00 Reel de Quebec (DK/Ongl.)
Kl. 22.15 Afenginn (DK/FI/PÓ)
Kl. 01.00 Spælimanstónleikur og felagssangur

**Sunnudag 24. juli**
**Kl. 16.00 NORÐURLANDAHÚSIÐ, TÓRSHAVN**

Tónabond (FØR/HETL)
Reel de Québec (DK)
Færd (DK/Svøríki)
Afenginn (DK/FIN/PÓL)

**Mánadag 25. juli**
**Kl. 20.00 MYKINES**
Reel de Québec (DK)
Kári Sverrisson (FØR)
Spælimenninir (FØR)
Nadin (Irak)
Færd (DK)
Afenginn (DK/FIN/PÓL)

## Morgunlestrar
**20. - 25. juni**

***Christian Reinert Petersen, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 18. juli:**
nr. 231 Vit Halgan Anda biðja nú
nr. 368 Tú, sum okkum lívið gevur

**Týsdagin 19. juli:**
nr. 247 Man í huganum enn finnast
nr. 414 Hoyr, Jesus, meg

**Mikudagin 20. juli:**
nr. 267 Eg veit, hvar góð er grundin
nr. 44 Á halgan botn eitt hús er sett

**Hósdagin 21. juli:**
nr. 507 Onga tíð er frá mær vái
nr. 322 Eg skar mítt navn

**Fríggjadagin 22. juli:**
nr. 401 Frels oss, Gud, frá hinum illa
nr. 248 Guðs kirkjulið er heimsins størsta undur

**Leygardagin 23. juli:**
nr. 249 Guds kirkjugrund aleina
nr. 255 Vár Guð er føst og haldgóð borg

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. við Ísland fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.




**Í dag:**
Eitt djúpt lágtrýst, 984 hPa. við Hvarvið fer spakuliga eystureftir og kuldabrúgvin haðani verður við Føroyar sunnukvøldið.

Brúdarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúdar- og brúdargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

## VESTFALLSKYRRINDI

8. juli — Mánin longst frá jørðini
14. juli — Fyrra kvarter
21. juli — Fullmáni/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. Juli | 02.43 | 15.05 | 01.43 | 14.05 | 01.58 | 14.20 | 04.43 | 17.05 | 05.43 | 18.05 | 00.58 | 13.20 | - | 12.20 | 02.58 | 15.20 | 03.58 | 16.20 | 02.28 | 14.50 | 03.43 | 16.05 |
| 17. Juli | 03.27 | 15.52 | 02.27 | 14.52 | 02.42 | 15.07 | 05.27 | 17.52 | 06.27 | 18.52 | 01.42 | 14.07 | 00.42 | 13.07 | 03.42 | 16.07 | 04.42 | 17.07 | 03.12 | 15.37 | 04.27 | 16.52 |
| 18. Juli | 04.17 | 16.45 | 03.17 | 15.45 | 03.32 | 16.00 | 06.17 | 18.45 | 07.17 | 19.45 | 02.32 | 15.00 | 01.32 | 14.00 | 04.32 | 17.00 | 05.32 | 18.00 | 04.02 | 16.30 | 05.17 | 17.45 |
| 19. Juli | 05.14 | 17.42 | 04.14 | 16.42 | 04.29 | 16.57 | 07.14 | 19.42 | 08.14 | 20.42 | 03.29 | 15.57 | 02.29 | 14.57 | 05.29 | 17.57 | 06.29 | 18.57 | 04.59 | 17.27 | 06.14 | 18.42 |
| 20. Juli | 06.10 | 18.40 | 05.10 | 17.40 | 05.25 | 17.55 | 08.10 | 20.40 | 09.10 | 21.40 | 04.25 | 16.55 | 03.25 | 15.55 | 06.25 | 18.55 | 07.25 | 19.55 | 05.55 | 18.25 | 07.10 | 19.40 |

5 707265 100067 >